# ítróttur

Nr. 48 • mikudagur • 8. mars 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Heidi gleðir seg til at koma í gongd aftur

**Svimjarin Heidi Andreasen hevur ikki verið við í altjóða kapping síðani 2004, men nú fyrireikar hon seg til HM í Suðurafrika í november, og um vikuskiftið verður hon við í Danish Open í Esbjerg**

SVIMJING
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Um vikuskiftið kavar ÍSB-svimjarin Heidi Andreasen út í aftur eina altjóða kapping. Svimjarin við teimum framúr góða altjóða úrslitunum hevur ikki verið til kapping uttanlands, síðani hon vann bronsu á paralympisku leikunum í Athen í 2004.

– Fyrstu tíðina eftir paralympisku leikirnar brúkti eg nógva tíð til skúlan. Eg hevði verið burtur í ein mánað, og tí legði eg stóran dent á skúlan í eina tíð. Men síðani í fjørsummar havi eg vant aftur sum vanligt, sigur Heidi Andreasen.

Næsta stóra málið hjá henni er heimsmeistarakappingin í Durban í Suðurafrika síðst í november mánaði, og í løtuni venir hon miðvíst fram ímóti tí kappingini.



*– Eg verði liðug við studentaskúlan í summar, og aftan á tað ætli eg mær at brúka enn meira tíð til svimjingina, sigur Heidi Andreasen, sum ætlar sær at vera í toppformi til HM í november mánaði*

**Partur av venjingini**

Um vikuskiftið verður Heidi Andreasen við í Danish Open, sum verður hildin í Esbjerg fríggjadagin, leygardagin og sunnudagin. Heidi verður við í fimm kappingum – 50, 100, 200 og 400 metrar frísvimjing og 100 metrar ryggsvimjing.

– Eg hava ikki trappað venjingina niður til kappingina, og tí er hendan kappingin ein partur av venjingini hjá mær. Eg skal í gongd aftur við altjóða kappingar, og Danish Open er ein góð byrjan, sigur Heidi Andreasen.

– Hóast hendan kappingin er ein liður í fyrireikingunum til HM, og eg kenni meg eitt sindur tunga eftir nógva harða venjing, so vil eg royna at fáa eitt so gott úrslit sum gjørligt, sigur hon.

Heidi dugir ikki at meta um møguleikarnar fyri at vinna heiðursmerki í kappingini, tí hon veit ikki rættiliga, hvørjir svimjarar eru við, og hvussu støðið verður í kappingini. Men tað er tó greitt, at svimjarar úr fleiri londum eru við, og at onkrar av teimum, sum Heidi vanliga kappast við, eisini fara at taka lut.

**Liðug við skúla – meira svimjing**

Kappingin í Esbjerg um vikuskiftið verður tann fyrsta av fleiri altjóða kappingum, sum Heidi Andreasen ætlar sær at vera við í ár. Øll venjing og kapping næstu tíðina verður gjørd við HM í huga, og ætlanin er millum annað, at Heidi skal verða við í eini kapping í British Open í Sheffield í juli mánaði.

– Eg verði liðug við studentaskúlan í summar, og aftan á tað ætli eg mær at brúka enn meira tíð til svimjingina, sigur Heidi Andreasen, sum ætlar sær at vera í toppformi í november mánaði.

Venjari hjá Heidi Andreasen er Jón Bjarnason, landsliðsvenjari, og hann skal fylgja við Heidi undir kappingini í Esbjerg um vikuskiftið.

# Fyrsta hálvfinalan

**Kvinnuliðini hjá Neistanum og Kyndli fara longu í kvøld at spæla fyrru hálvfinaluna sínamillum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Endaspælið í bestu kvinnudeildini var av sunnudagin, og nú er soleiðis klárt til hálvfinalurnar.

Fyrsta av hesum verður í kvøld klokkan 19, tá Neistin og Kyndil hittast fyri aðru ferð innan f‡ra dagar, áðrenn tey aftur hittast longu leygardagin. Upprunaliga varð ætlanin, at dystirnir skuldu spælast leygar- og sunnudag, men nú Kyndil skal hava 50 ára føðingardag, eru dystirnir framskundaðir.

Tað er einki at ivast í, at Neistin er stórfavorittur at vinna dystin. Bláu grannarnir hava havt sera góðan byrð í endaspælinum, har tær eisini gjørdust nummar eitt. Liðið hevur fyri stuttum vunnið steypakappingina, og í dystunum móti Kyndli í endaspælinum hevur talan verið um veruligar stórsigrar.

Heilt avskrivast skulu tær grønu tó ikki. Tær hava í løtum s‡nt heilt gott spæl. Millum annað fyrsta korterið í dystinum móti Neistanum sunnudagin. Sveiggini í einstøku dystunum hava tó verið ov stór, og tá liðið fer niður, tykist tað hvørja ferð vera við einum braki.

So er spurningurin, hvørt tær í kvøld megna at halda høvdið kaldari, enn tær annars hava gjørt.

Hjá monnunum verður eisini talan um dyst. KÍF og Kyndil spæla í Hovyíkarhøllini kl. 20. Vinnur Kyndil hendan dystin, eru teir vísir í einum finaluplássi.

## Helgi heldur fram

Helgi Dam Ziska vann sær aftur framúr gott úrslit, tá næsta umfarið í Reykjavík Open stóð á skránni.

Hesa ferð telvdi Helgi móti svenska Ralf Åkerson, sum er stórmeistari og styrkismettur sum nummar 24 í kappingini.

Helgi hevði frammanundan sett sær fyri, at hann skuldi hava í minsta lagi eitt hálvt stig ímóti sterka svenska telvaranum, og tað eydnaðist. Talvið teirra millum endaði við remis.

Eftir tveimum umførum hevur Hleig soleiðis vunnið 1,5 stig. Í triðja umfarinum verður talan um dyst móti serbiskum stórmeistara. Hesin eitur Ivan Ivanisevic, er styrkismettur sum nummar 10 í kappingini og hevur 2588 ratingstig.

**- mørk**

## Fleyr vinnur gull í dag

So kunnu menninir hjá Fleyr fyrireika seg til seinasta partin av fullveitsluni. Í dag spæla teir útidyst móti Nøvuni, og vinna teir dystin, er meistaraheitið ordiliga heima.

Enn hevur Nøvan ikki vunnið nakað stig í kappingin í meistaradeildini, og tí vil talan vera um meira enn sensatión, um Fleyr skal kiksa á Eiði.

**-mørk**

## Høgni verður formaður

Kappingarnevndin hjá Fótbóltssambandinum hevur í vikuni skipað seg. Á aðalfundinum herfyri boðaði formaðurin í kappingarnevndini seinastu tvey árini, Bjarki Mohr, at hann ikki tók við afturvali. Nýggjur maður í nevndini hjá FSF gjørdist Høgni í Stórustovu,og tað tykist, sum vil FSF sleppa undan teimum heilt stóru rokadunum, nú ein limur er skiftur. Í øllum føurm er Høgni komin beint í sessin hjá Bjarka sum formaður í kappingarnevndini.

**-mørk**